

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 08 - 2012

# Statoil gevur makrelinum frið

Norska oljufelagið Statoil hevur gjørt av at steðga við sínum seismisku kanningum fyri ikki at órógva fiskimenninar, sum veiða makrel. Hetta hendir á Kvitebjørnsfeltinum í Norðsjónum. Vónandi kann tann so týðandi makreltíðin ganga sum vænt. Tað er nevniliga partur av spenninginum og óvissuni í náttúruni, um fiskurin flytur seg eins og hann hevur gjørt seinastu árini, sigur aðalskrivarin í Noregs Fiskarlag, Jan Skjærvø. Felagið hevur leingi lagt trýst á myndugleikarnar at fáa teir at steðga seismiskum kanningum, tá makreltíðin er fyri. Í hesum sambandi hevur verið tosað við Statoil um at taka hædd fyri hesum. Og hetta er so nakað, sum oljufelagið hevur tikið til eftirtektar. Hvussu leingi steðgurin í seismikkskjótingini varir er enn óvist skriva norskir miðlar.

